Føroyskt Hetlendskt Vinafelag
c/o Erhard Jacobsen
Boks 3081
FO-110 Tórshavn

(Medio februar 2009)

Smyril Line p/f
J. Broncksgøta 37
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

Føroyskt Hetlendskt Vinafelag hevur júst havt aðalfund. Eitt av málunum, ið vórðu umrødd á fundinum, vóru ferðamøguleikarnir úr Føroyum og til Hetlands, sum eru munandi versnaðir í seinastuni.

Heilt frá gamlari tíð hevur nógv samband verið millum Føroyar og Hetland, bæði politiskt, vinnuligt, ítróttaligt og mentanarligt, og vanliga hevur eisini verið regluligt ferðasamband millum londini bæði.

Felagið kann tí bara harmast, at handilsligu ferðamøguleikarnir millum Hetland og Føroyar nú eru munandi skerdir ella heilt burtur, síðan Smyril Line tók avgerð um, at Norrøna ikki at longur skuldi sigla til Hetlands.
Henda avgerð ger sítt til at slíta tað góða og gevandi sambandið, sum er millum nógvar føroyingar og hetlendingar. Hetland er ein av okkara grannatjóðum, sum er áhugavert ferðamannaland, við ríkari søgu, náttúru og mentan.
Óhugsandi er ikki, at eitt gott ferðasamband kundi verið støði undir meira víðfevndum samstarvi millum londini.

Felagið skilur væl, at virki skulu hava peningaligt avlop av sínum virksemi. Hinvegin halda vit tað vera løgið, at tað ikki á onkran hátt skal kunna berast so í bandi, at Hetland framvegis kann standa á ferðskránni hjá Smyril Line, kanska ikki so ofta sum áður, men so í øllum førum av og á. Hetta hevði eisini verið náttúrligt, tí hetlendingar stuðlað hesi ferðaleið og hava líka frá byrjan átt munandi part í Norrønu.

Vit vóna at Smyril Line tekur ferðaskránna upp til umhugsunar av nýggjum og tá hevur í huga at bjóða føroyingum Hetland sum eitt av tykkara ferðamálum.

Vinarlig heilsan

Erhard Jacobsen, formaður